# Útibarnagarður í Kunoy samtyktur

**Ætlanin, at gera ein útibarnagarð í Kunoy í samstarvi við Kunoyar Kommunu, er samtykt í Klaksvíkar Kommunu**

BARNAANSING
*Solby A. Eliasen*



*Um Kunoyar Kommuna samtykkir ætlanina, verður útibarnagarður í Kunoy eftir summarfrítíðina.*

**Klaksvík, Sosialurin:** - Ætlanin er tó ikki, seinast eg visti, løgd fyri Kunoyar kommunu. Men um Kunoyar Kommuna tekur undir við ætlanini, so verður útibarnagarðurin eftir øllum at døma veruleiki í august, sigur Eyðgunn Samuelsen, formaður í Sosialu nevnd í Klaksvíkar Býráð.

### Bygdarhúsið verða karmur

Hesin útibarnagarðurin skal húsast í bygdarhúsinum í Kunoy. - Tað ber til at nýta húsið, sum tað er, men tað skal kortini byggjast um. Eisini skulu umstøðurnar uttanfyri betrast.

- Men so skal eisini leggjast afturat, at tað verður Kunoyar Kommuna, sum skal taka sær av øllum umbyggingum, ið standast av hesum. So hvussu langa tíð tað tekur, verður eisini ein avgerandi liður í, nær útibarnagarðurin kann verða tikin í nýtslu, heldur Eyðgunn fram.



*Eyðgunn Samuelsen*

### Sunnari og bíligari

Harumframt verður ein útibarnagarður úti í Grøv eisini tikin í nýtslu skjótt. Eyðgunn Samuelsen sigur, at orsøkin til, at tey arbeiða so nógv við at gera útibarnagarðar er, at so fáa børnini eina mótvekt til alt tað materiella, sum tey eiga í dag.

- Tað er ein sunn loysn, sum eisini er bíligari, sigur hon.

Útibarnagarðurin í Kunoy kemur at taka í móti umleið 30 ella 40 børnum. So skal eitt savningarstað finnast í Klaksvík, har børnini so fara í ein buss, sum koyrir tey til og frá barnagarðinum.

- Tað kundi til dømis verið bussurin hjá Bygdaleiðum, um man kundi gjørt eina avtalu við hann, sigur Eyðgunn.

- Vit hava ein serflutningsbuss í Kommununi, men tað verður torført at fáa hann, tí hann hevur ov mikið at gera sum er, greiðir Eyðgunn frá.

### Børn í Kunoy tryggjað

Klaksvíkar Kommuna og Kunoyar Kommuna hava avtalu um, at børn úr Kunoy eru í dagrøkt í Klaksvík.

- Aftaná dagrøktina kunnu tey nú halda fram í Kunoy, so á tann hátt eru tey tryggjað ansingarpláss, sigur Eyðgunn.

Við báðum teimum nýggju útibarnagørðunum, sum eru væl áleiðis, verða tað áleið sjeyti ella áttati nýggj ansingarpláss í ár. Í løtuni standa umleið 150 børn á bíðilista í Klaksvíkar Kommunu.

## VIÐMERKINGAR

# Hevur handilsligt skil og varsemi verið galdandi seinastu 4 árini?

**Fríðálvur Jensen**

At siga 366 milliónir frá sær og stórt sæð onki fáa afturfyri, er ikki júst nakað ein skal ganga runt og reypa sær av

Um vit venda hesum á høvdið, so kann hetta samanberast við at fara út at keypa sær eina vøru, gjalda fyri hesa og siga, at handilin kann eiga vøruna.

Eg má siga, at tað er ikki lætt at skila orðini, sum verða slongd út frá tjóðveldisfólki í hesum døgum, at frælsi bert finnst í tí búskaparliga frælsinum – í mínari verð er frælsi annað enn bara pengar.

Vit kunnu eisini seta spurningin, um tíðin er komin, at vit skulu missa so stóran part av veitingini úr Danmark í einum – er hetta ein skilagóð fullveldisleið – ella er hetta bara eitt svar uppá, at danir ikki vildu veita føroyingum eina longri skiftistíð enn 4 ár – um so er, hava tit givið tykkum og føroyska fólkinum ein frammaná.

So kundi onkur skunda sær at sagt, at danir fara at krevja ein minking í blokkinum, tí undanfarnu fíggjarlógirnar hava givið avlop, men eg kenni onki til eitt slíkt krav, tí samráðast skal um blokkin, so slíkt kann ikki brúkast til nakað, sum helst.

### Vit og skil

Var tað rætt, at vit søgdu farvæl til 366 milliónir júst nú, tá við hava fingið úttalilsir frá bankastjóra, sum sigur, at okkara høvuðsvinna hevur sæð sína gulltíð, og so skal ikki nógv til at hugsa sær, at tað fer at ganga hin vegin – vónandi ikki ov langt.

Vit í Sambandsflokkinum vilja sjálvandi, at leiðin eisini skal ganga ímóti tí frælsinum, at vit kunnu hava ein sjálvberandi búskap, men hava eisini tað stevnu, at hetta skal gerast við skili, og tá vit lata nakað frá okkum, skuldu vit gjarna fingið eitthvørt afturfyri.

Vit vita eisini, at tað eru økir í landinum, har peningur skal til, t.d. innan almanna- og heilsuøkið, so tað er púra óskiljandi, at hesir menn siga pening frá sær, uttan at hyggja eftir hvussu tað gongst í høvuðsvinnuni.

### Leiðin fram

Eisini á hesum økinum er tað neyðugt at fáa nýhugsan og nýtt fólk framat, sum kann leggja ein skilagóðan politikk tilrættis, sum Føroya fólk kunnu kenna seg trygg við og okkara eftirkomarar kunnu taka upp eftir okkum.

Hetta vil Sambandsflokkurin berjast fyri í eini komandi samgongu!



Dvørgur longdur 22 sentimetur:

# Nú passi eg inn í samfelagið



**- Nú passi eg inn í tað modernaða samfelagið, sigur 27 ára gamli Hans Jacob Heinesen úr Klaksvík. Fyri átta árum síðani fór hann undir drúgva viðgerð at leingja bæði beinini.**

SAMRØÐA
*Solby A. Eliasen*

Ikki sæst á manninum, sum situr yvir av mær, hvat hann hevur verið fyri tey seinastu árini. Men tá hann reisist fyri at fara eftir kaffinum, sást týðiliga, at maðurin haltar. Maðurin er Hans Jacob Heinesen og hann hevur brekið Achondroplasi. Ella sum vit betri kenna tað, hann er dvørgur. Hans Jacob og familja hansara fréttu fyri fyrstu ferð um møguleikan at leingja beinini, tá Hans Jacob var um fjúrtan ára aldur. Men sjálvur sigur hann, at tá vildi hann ikki hoyra um tað.

- Tá vildi eg slettis ikki hoyra um, at eg var øðrvísi, enn minni góðtaka tað, sigur Hans Jacob.

- Harafturat var hetta seinast í áttati-árunum, og var henda viðgerð ikki so framkomin tá. So vit hildu, at tað fór at verða ov hart hjá mær at fara ígjøgnum á so ungum árum, greiðir Hans Jacob frá.

Men, so hvørt, sum Hans Jacob eldist, byrjaði hann at fáa trupulleikar við beinunum, og tankin, um at leingja beinini, byrjaði so smátt at spøkja aftur í huganum hjá honum. Gordon Rajani, skurðlækni á Klaksvíkar Sjúkrahúsi hevði hoyrt um ein spanióla, sum hevði góða útgerð til at leingja fólk og eisini nýtti ein meiri framkomnan framferðarhátt. Eisini kundi tað lata seg gera at verða viðgjørdur á Ríkissjúkrahúsinum. Gordon Rajani segði eisini, at beinini helst bert fóru at halda til hann var 25 ára gamal. Og so fór hann at verða bundin at einum koyristóli restina av lívinum. So á sumri í 1993, tá Hans Jacob var átjan ára gamal, tók hann avgerðina um at leggjast undir skurð. Ein viðgerð, sum skuldi føra við sær, at Hans Jacob fór frá at gerast 22 sentimetur longri ella 158 sentimetur móti 136 undan skurðviðgerðini.

### Alt var ov høgt

Ein dvørgur er ikki gjørdur til henda heimin, her hugsi eg um, at bara tað at vaska hendur er ein trupulleiki, tí tú røkkur ikki upp. Tá eg keypti mær buksur, so fór helvtin vekk, eg kundi ikki koyra bil og so framvegis, greiðir Hans Jacob frá.

- Tá alt var yvirstaðið, og eg kom heimaftur til venjingar á Klaksvíkar Sjúkrahúsi, føldi eg tað, sum lívið byrjaði av nýggjum. Tað gekk framúr væl at koma upp aftur á beinini, og nú passaði eg inn í samfelagið í stødd.

### Fyrsta umfar

Skurðviðgerðin var í tveimum. Triðja februar1994 fór Hans Jacob undir fyrstu skurðviðgerðina. Nú skuldu undirleggirnir leingjast. Skurðviðgerðin vardi í fýra og ein hálvan tíma. Læknarnir boraðu fimm hol ígjøgnum beinið uppi við knæið og fimm hol niðri við fótliðin. So vórðu pinnar koyrdir inn í holini og boylar settir rundan um beinini bæði í erva og neðra. Síðani settu teir eina jarnstong ímillum boylarnar. So fóru teir inn og brutu beinið. Eina viku seinni byrjaðu teir at skrúva beinini frá hvørjum øðrum, okkurt um ein millimetur um dagin í 110 dagar. Alt í alt 11 sentimetrar.

- Eg hevði ikki pínu, meðan hetta stóð upp á. Men givið er, at eg slapp ikki so væl runt. Men eg hevði ein koyristól, so eg slapp altíð upp, um eg vildi tað, greiðir Hans Jacob frá. Hann var niðri í einar sjey vikur og slapp so heim, men bara í fjúrtan dagar. Tí hann skuldi til eftirkanningar. Læknarnir vildu halda eyga við Hans Jacob, tí hann var tann fyrsti á Ríkissjúkrahúsinum, sum longdi bæði beinini.

Tá beinini vóru longd ellivu sentimetrar, bleiv ikki skrúvað meir. Nú skuldi alt bara hava frið at grøa. So blivu boylarnir tiknir av og Hans Jacob skuldi binda frið í umleið eitt ár.

### Annað byggistig

Seinna skurðviðgerðin fór í gongd í januar 1996 og var sami framferðarháttur nýttur.

- Hetta var tó lættari at ganga við, tí at nú vóru ongir boylar rundan um beinini, bert niður við síðunum. So eg kundi ganga við høkjum, tað var ein stórur fyrimunur, sigur Hans Jacob. Men henda viðgerðin gekk ikki so lætt sum hin. Beinini í yvirleggunum vuksu ov skjótt saman aftur og tað tarnaði leingingini. So læknarnir noyddust inn at bróta beinið aftur.

- Eg hevði nógva pínu, meðan tað vaks saman, men tá læknarnir høvdu loyst trupulleikan, so gekk alt fínt aftur.

Aftaná enn eina strævna og harða tíð, var Hans Jacob búgvin at byrja lívði aftur sum ein nýggjur maður. 22 sentimetrar longri enn hann var.

### Lívið steðgar uppaftur

Fríggjanáttina tann 01.03.1997 klokkan hálvgum tvey kom Hans Jacob út fyri einum ferðsluóhappi, sum hevði álvarsligar fylgjur við sær. Beinini fóru illa. Hann breyt annað lærið, bæði knøini og annan fótliðin. Aftaná eina skurðviðgerð, sum vardi tólv til fjúrtan tímar, skuldi hann hava gips uppi á í seks vikur, meðan hann hvíldi og aðrar seks vikur, meðan hann var til uppvenjingar. Eftir hetta varð greitt, at annað beinið var stytt fimm til seks sentimetrar aftur. Og Hans Jacob noyddist niður aftur í 1999 at leingja beinið.

### Nógva og góða hjálp

- Sjálvandi vóru tað løtur, har eg hugsaði, hvat er tað eg eri farin í holt við. Kanska serliga tá vinir mínir skuldu okkurt, sum eg ikki kundi, men tá ein fer undir tílíkt, er tað týdningarmikið, at góð hjálp er at heinta. Og tað hevur tað so sanniliga verið hjá mær, sigur Hans Jacob, sum ikki angrar.

- Bæði foreldrini hava verið ein hollur stuðul allan vegin, og eisini hava mínir vinir verið sera góðir við meg. Ofta komu teir eftir mær, so vit kundu fara ein biltúr ella gingu vit ein túr. Fólk í Klaksvík, ja, býurin í heila tikið, hevur verið sera góður við meg. Annars fekk eg ein elektroniskan koyristól, og hann nýtti eg nógv, inntil eg sjálvur kundi fáa mær koyrikort, greiðir Hans Jacob, sum í dag koyrir ein vanligan persónbil, frá.

### Enn er ikki komið á mál

- Sum er, eri eg nú náddur til tað punktið, har tað ikki verður betri, tí eg havi trupulleikar við rygginum, sigur Hans Jacob.

- Eg skal aftur undir skurð orsakað av rygginum, men hóast alt, so var tað tað vert. Beint eftir ferðsluvanlukkuna misti eg mótið eina tíð, men eg hugsaði bara sum so, at eg havi fingið eina stóra gávu afturfyri: Eg passi betur til verðina nú.